VEKS

# Størv í Heimatænastuni í VEKS

**Fylgjandi størv eru leys at søkja:**

**VEKS Vestur** (Vestmanna- og Kvívíkar Kommuna)

1. **Heilsuhjálpari í starvsbrøki 0,6**
   Arbeitt verður í skiftandi vaktum gerandisdagar og annað hvørt vikuskifti á Heiminum á Grønanesi og í økinum úti Vestur.
   Talan er um barnsburðarfarloyvisstarv frá 01.01.2018 – 31.08.2018.

2. **Vaskifólk í starvsbrøki 0,5**
   Arbeiðsstaður er á Heiminum á Grønanesi at byrja 01.01.2018.

**VEKS Eystur** (Sunda- og Eiðis Kommuna)

3. **Heilsurøktari ella heilsuhjálpari í starvsbrøki 0,7**
   Arbeiðsstaður er Korndalsbýlið á Eiði, at byrja 01.02.2018. Arbeitt verður í skiftandi vaktum og annað hvørt vikuskifti.

4. **Sjúkrarøktafrøðingur, heilsurøktari ella heilsuhjálpari í starvsbrøki 0,7**
   Arbeiðsstaður er Røktarheimi á Mørkini í Streymnesi at byrja skjótast gjørligt.
   Arbeitt verður í skiftandi vaktum og annað hvørt vikuskifti.

5. **Heilsuhjálpara ella heimahjálp í starvsbrøki 0,5**
   Arbeiðsstaður er VEKS Eystur at byrja skjótast gjørligt.

**Førleikar**
Vit sóknast eftir fólki sum m.a. hava:

- Viðkomandi útbúgving
- Jaligan hugburð til virksemið og sosiala umhvørvið í síni heild, í tøttum samstarvi við leiðarar, fakbólkar, starvsfólkahóp og einstaka borgaran.
- Telduførleika á brúkarastøði.
- Koyrikort til persónbil.

**Vit kunnu bjóða**

- Fjølbroytt størv
- Jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- Skipaða innleiðslu

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Setanarstaðið er Heimatænastan í VEKS, við útgangsstøði frá støðunum, sum nevnd eru omanfyri.

Størvini verða sett sambært sáttmála hjá avvarðandi fakfelag.

**Umsókir**
Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, lívsrensli (CV), viðmælum v.m. skal sendast til veks@veks.fo ella til adressuna: Heimastænastan í VEKS, Bakkavegur 59, 350 Vestmnanna.

**Freist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **týsdagin 12. desembur 2017.**

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til:

- Miu Pedersen, leiðara fyri **VEKS Vestur**, á telefon 793231.
- Poulu Reinert-Petersen, leiðara fyri **VEKS Eystur**, á telefon 793251.

Upplýsingar um VEKS og virksemi okkara, er á heimasíðuni www.veks.fo.